Navn og persónnr. (spjaldur)

# Samtykki til at geva víðari heilsuupplýsingar til gransking og goyma lívfröðiligt tilfar frá sjúklingum á Ríkissjúkrahúsinum.

Í sambandi tína viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum vilja vit fegin goyma royndir frá tær í einum lívfröðibanka. Royndirnar kunnu í framtíðini verða nýttar til starvsstovugranskingar til at nágreina samhangini millum arv, ígerðir, umhvörvi, lívshátt og aðrar sjúkur, og so ta sjúku, tú hevur. Endamálið er at betra  sjúkuavgerðan og sjúkuviðgerð í sambandi við sjúklingar við somu sjúku sum tú.

Allar granskingarverkætlanir, ið hava uppruna í lívfröðibankanum, skal Vísindasiðseminevndin góðkenna eins og tær skulu fráboðast Dátueftirlitinum.

Upplýsingar um sjúku tygara, lýstar omanfyri, vilja verða nýttar soleiðis, at samleiki tygara sæst ikki (verða navnleysar)

---

Loyvt verður, at blóð og annað lívfröðiligt tilfar verður goymt til seinni vísindaliga nýtslu innan mín sjúkuflokk/mína sjúkuavgerð.

Ja ☐ Nei ☐

Um eg angri, er tað mær kunnugt, at eg kann venda mær til starvsfólkini á Ríkissjúkrahúsinum og fáa bóklingin ”Dit væv, dit valg”, ið Innanríkis- og Heilsumálaráðið hevur útgivið, útvegaðan, og sum vegleiðir mær í at taka áður nevndu játtan aftur *uttan, at tað fer at ávirka hesa viðgerð ella viðgerðir í framtíðini.*

Dagf.: ____________________ Undirskrift: __________________________

Móttikið váttanina hevur: ____________________________

**Vinaliga gev starvsfólkunum ta útfyltu váttanina**

**24. november 2015**

**Gransking til gagns fyri komandi sjúklingar**

Vit spyrja her, um tú loyvir, at vit goyma lívfröðiligt tilfar frá tær í PERSIMUNE-lívfröðibanka við komandi gransking í órinsverjuni móti ígerðum í hyggju.

Í PERSIMUNE-lívfröðibanka verður goymt ymist lívfröðiligt tilfar frá sjúklingum, sum kunnu vera í vanda fyri at verða fongdir við ígerð, tí órininkervið hjá teimum kanska ikki riggar heilt eftir vild. Tilfarið úr lívfröðibankanum fer seinni at verða nýtt til granskingarverkætlanir, ið hava til endamáls gjölligari at nágreina sjúkuviðurskiftini viðvíkjandi vandanum fyri at verða fongdur við ígerð.

Neyva miðið í hesum granskingarverkætlanum er ikki greitt enn. Í hövuðsheitum fer lívfröðiliga tilfarið at verða fyri starvsstovugreiningum, sum fara at kunna um, hvussu órininkervið virkar, um evnaskiftið ella um eina möguliga ágangandi ígerð. Hesar greiningar kunnu ávísa sneytevni. Talan kann eisini verða um at greina ta íleguligu upplýsing, sum tað lívfröðiliga tilfarið inniheldur, fyri á tann hátt at nágreina týdningin av arvi fyri förleikan hjá menneskjum til at fáa órininkervið til at rigga og fyri vandanum fyri at verða fongdur við ígerð. Greiningarnar fara at miðja ímóti royndum tiknum av sjúklingum eins væl og av teim smáverum, ið möguliga eru í tilfarinum.

Upplýsingartilfar frá hesum greiningum fer at verða knýtt at upplýsingunum í sjúkudagbókini hjá tær fyri best gjörligt at tulka úrslitini. Tað lívfröðiliga tilfarið, tú letur PERSIMUNE-lívfröðibankanum hevur tí stóran týdning fyri arbeiðið hjá granskarunum at finna nýggja sjúkuavgerðan og viðgerð til gagns fyri komandi sjúklingar. Starvsstovugreiningar og dátuviðgerð av úrtökum fara at fara fram á Ríkissjúkrahúsinum ella hjá okkara samstarvsfelagum á almennum stovnum í ES-londum.

Blóðroyndirnar til PERSIMUNE-lívfröðibanka verða tiknar samstundis sum aðrar blóðroyndir, ið verða tiknar sum liður í viðgerðini og fara tí ikki at hava eyka prik við sær. Blóð verður tikið í trý royndartökurör (2 x 9 ml og 1 x 3 ml), og tann lítla nögdin hevur ongan heilsuligan týdning.

Blóðroyndin – og möguligar spýtt- og skarnsroyndir – verða tiknar í sambandi við, at samtykki verður givið, eftir 3 - 6 mánaðir og síðani árliga so leingi tú ert undir eftirliti á Ríkissjúkrahúsinum. Royndartökuætlanin kann verða broytt, um tú ert undir viðgerð, ið ávirkar órininkervið ella fært tekin um bráða lækkaða mótstöðumegi fyri ígerð.

Vit skráseta og goyma royndirnar sambært góðkenning Dátueftirlitsins. Persónsupplýsingar viðgerða vit í fullum trúnaði. Áðrenn vit nýta royndir úr lívfröðibankanum til granskingarverkætlanir, skulu Vísindasiðseminevndin og Dátueftirlitið góðkenna hvörja einstaka verkætlan.

Tað er sjálvboðið um tú luttekur, og títt val fer á ongan hátt at ávirka núverandi ella komandi viðgerð hjá tær. Um tú velur at luttaka og seinni angrar, kanst tú altíð við beinanvegin-gildi taka tína tilsögn aftur uttan, at tær nýtist at geva nakra grundgeving.

Um tú seinni angrar títt samtykki, biðja vit teg bera so í bandi, at tín avgerð verður skrásett í Vevnaðarnýtsluskrásetingini. Tað kanst tú gera við at útfylla oyðublaðið ”Dit væv, dit valg”, sum tú skalt senda til Vevnaðarnýtsluskráseting Heilsustýrisins. Um tær törvar hjálp, kanst tú seta teg í samband við starvskólkið á deildini ella PERSIMUNE-miðstöðini.

*Takk* fyri, at tú gavst tær stundir at lesa hesa kunning og tókst stöðu viðvíkjandi spurninginum um lívfröðibankan.

Vit biðja teg taka stöðu til, um tú loyvir PERSIMUNE-lívfröðibanka at goyma royndir frá tær við at útfylla og undirskriva viðlagda samtykki til at geva víðari heilsuupplýsingar og goyma lívfröðiligt tilfar.

Vinaliga
Starvsfólkini í PERSIMUNE

Upplýsingar um PERSIMUNE kunnu útvegast hjá CHIP, Klinik for infektionsmedicin, Afsnit 2100, Rigshospitalet, Blegdamsvej 9, 2100 København Ø. Tlf.: 35455757 (kl. 9-15). E-mail: persimune.rigshospitalet@regionh.dk